Viðfesti 2

Skúvoy (1A6, 2B4 og 2C4)

Fuglur

Búfuglur: Tjaldur (*Haemotopus ostralegus*), Spógvi (*Numenius phaeopus*), Lógv (*Pluvialis apricaria*), Mýrisnípa (G*allinago gallinago*), Kjógvi (*Stercorarius parasiticus*), Skúgvur (*Stercorarius skua*), Terna (*Sterna paradisea*), Steinstólpa (*Oenanthe oenanthe*), Summartíttlingur (*Anthus pratensis*) og Grátíttlingur (*Anthus petrosus*), Villdunna (*Anas platyrhynchos*), Teisti (*Cepphus grille*) og Lundi (*Fratercula arctica*).

Talvan vísir: Tal av pørum. Váði, hvat væntast at ávirka fuglin: 1. Ljóðdálking. 2. Órógv undir bygging. 3. Beinleiðis skaði vegna samanbrest. 4. Miss av tilhaldslendi. 5. Broyting av lendinum. 6. Økt órógv undir vegagerð. 7. Økt varandi ferðsla eftir byggitíðarskeið. Avleiðing: + = positiv, 0 = ongin og – = negativ avleiðing. o/- merkir sostatt, at ongin ella kanska negativ avleiðing verður væntað. CMS stendur fyri Convention on Migratory Species (Bonnsáttmálin).

Fuglaslag	Tal pør	CMS	Reyðlisti	Viðmerk.	Váði. Væntað ávirkan	Avleiðing +/0/-
Villdunna (*Anas platyrhynchos*)	1		VU	Viðbreki	1,2,4,7	0/-
Tjaldur (*Haematopus ostralegus*)	4	II	NT	Nærum hótt	2,5,7	0/-
Lógv (*Pluvialis apricaria*)	7	II	VU	Viðbrekið	2,4,5,7	0/-
Spógvi (*Numenius phaeopus*)	6	II	VU	Viðbrekið	2,4,5,7	0/-
Mýrisnípa (*Gallinago gallinago*)	1	II	NT	Nærum hótt	2,4,5	0/-
Kjógvi (*Stercorarius parasiticus*)	8		NT	Nærum hótt	2,3,4,5,	0/-
Skúgvur (*Stercorarius skua*)	2		VU	Viðbrekið	2,3,4,5	0/-
Steinstólpa (*Oenanthe oenanthe*)	8				2,4,7	0/-
Grátítlingur (*Anthus petrosus*)	8		NT	Nærum hótt	2,4,7	0/-
Summartítlingur (*Anthus pratensis*)	7		NT	Nærum hótt	2,4,7	+/0/-

Terna (*Sterna paradisaea*)	8-10		EN	Hótt	1,2,7	0/-
Teisti (*Cepphus grille*)	60-70		NT	Nærum hótt	1,2,5,7	0/-
Lundi (*Fratercula arctica*)	200		NT	Nærum hótt	1,2,5,7	0/-

Talt er innanfyri 1000 metrar frá ætlaða tunnilsmunnanum.

Plantur

Økið, ið er kannað í Skúgvoy, gongur frá seyðahúsinum og suður til Heimastaá. Bert lendið niðanfyri vegin og oman í fjøruna varð kannað. Lendið frá vegnum og oman í móti bakkanum er dyrkað lendi (sláttibøur), har smáar áir renna oman í gjøgnum bøin. Lendið í bakkanum er meira natúrligt lendi, har tað í støðum var ávirkað av, at fuglur eigur í bakkanum. Flestu plantusløgini, sum vóru funnin í økjnum, vórðu skrásett av vera sera vanlig ella vanlig. Fimm plantusløg vórðu skrásett at vaksa her og har, meðan eitt plantuslag var skrásett at vera sjáldsamt; tað var Smárukkut hømiliga (*Rumex cf crispus*). Eitt plantuslag, ið er á tí føroyska reyðalistanum, varð funnið í økinum. Tað er Reyður børkubóndi (*Dactylorhiza purpurella*). Á grótinum í urðini vuksu fleiri skóna- og mosasløg.